TIL **ARBEIÐIS**



*Ann-Britt Johannesen eigur og rekur handilin Insito Fashion á Toftum, sum selir klæðir og annað til kvinnur í øllum aldursbólkum. – Eg selji fisk fyrrapart og klæðir seinnapart, sigur hon brosandi*

FAKTA **ANN-BRITT**

**Arbeiðspláss:** Insito/ Fiskamarknaður Føroya

**Starv:** Handilsánari/ skrivstovukvinna
**Besta við starvinum:** Tvey góð størv og fjølbroytt arbeiði

**Ringasta við starvinum:** Eitt sindur strævið at renna ímillum, men sum heild fínasta slag

**Størsti dreymur við starvi:** At arbeiðsgleðin heldur fram

**Størsta frambrot:** Tað man fara at koma

**Starvstíð:** Eitt gott ár (Insito), trý ár (FMF)

**Lívsstarv:** Man skal aldrig sige aldrig...

**Starvsfólk:** 7 (Fiskamarknaður Føroya)

**Staður:** Toftagjógv 3, Toftir

**Starvsfólk:** 2 (Insito)

**Staður:** Oyrarnar 10, Toftir

# SELUR FISK FYRRAPART **OG KLÆÐI SEINNAPART**

**ANN-BRITT JOHANNESEN** HEVUR EITT FYRRAPARTSARBEIÐI OG EITT SEINNAPARTSARBEIÐI. HVØNN SEINNAPART Í VIKUNI SELUR HON KLÆÐIR, **SMÚKKUR**, SKÓGVAR OG TASKUR Í EGNUM HANDLI Á TOFTUM, OG HVØNN FYRRAPART SELUR HON **FISK** HJÁ SKIPUM



**TIL ARBEIÐIS**
Vilmund Jacobsen
vilmund@sosialurin.fo

Hon er ættað av Strondum, er gift yvir um Skálafjørðin og býr við Høganesveg á Toftum.

Kvinnan, vit tosa um, er Ann-Britt Johannesen, sum í meiri enn eitt ár bæði hevur selt fisk og klæðir.

Seinastu trý árini hevur hon arbeitt hálva tíð á Fiskamarknaði Føroya, og hin 19. september í 2008 læt hon egnan klædnahandil upp á Toftum.

- Arbeiðini kunnu ikki samanberast, tí tey eru púrasta hvørt sítt, men mær dámar bæði líka væl, sigur hon.

### Josi á Skála

Tá Ann-Britt var hálvvaksin genta, læt mamma hennara, Sigrun, saman við systrini, Jonnu, handil upp á Skála.

Tær góvu handlinum navnið Josi – eftir Jonnu og Sigrun.

Hetta var hin 18. november í 1980, og soleiðis hevur mamma Ann-Britt havt klædnahandil í meira enn 29 ár.

Í 1993 tók Jonna seg burtur úr Josi og fór undir matvøruhandilin Joma í niðaru hædd í sama bygningi sum Josi.

Ann-Britt arbeiddi av og á og onkuntíð yvir longri tíð í Josi, og sum vaksin var hon eisini fleiri ferðir í Danmark saman við mammu síniu á vørumessum.

Tá Ann-Britt fyri góðum árum síðan fór undir egnan handil í leigaðum hølum í Oyrunum á Toftum, var tað við tí fyri eyga at selja somu vørur sum Josi á Skála.

- Josi selur klæði, smykkur, skógvar, taskur og turrikløð til kvinnur í øllum aldursbólkum, og hetta konseptið dámar mær væl. Vit selja somu klæðir og somu vørur annars sum Josi, og eg haldi, at hetta hevur nakrar fyrimunir. Vit keypa inn saman, og tá onkur vøra vantar í øðrum handlinum, ber til at vita, um hon kanska finst í hinum, sigur hon.

Ann-Britt sigur, at hon og mamman plaga at vera í Keypmannahavn á messu í Bella Centrinum eina ferð um árið, antin í februar ella í august.

– Vit eru sjáldan við á báðum messunum, men plaga at verða við á aðrari, leggur hon aftrat.

### Insito Fashion

Navnið á klædnahandlinum hjá strandakonuni á Toftum er Insito Fashion. Handilin verður vanliga róptur Insito, sum merkir "Á staðnum" og fashion merkir "móti".

– Tað ræddi meg ikki frá at handla, at mamma mín hevur havt handil øll hesi ár, og at eg í tíðarskeiðum havi arbeitt hjá henni. Mær dámar væl at fáast við handil. Undirtøkan fyri handlinum hjá mær á Toftum hevur verið góð og veksandi, síðan vit lótu upp fyri 15 mánaðum síðan.

Ann-Britt letur bara væl at og sigur, at handilin stundum hevur nógva vitjan. Tí hevur hon eisini hjálparfólk um dagarnar.

–Vanliga lati eg handilin upp klokkan 13, eftir at eg eri liðug á Fiskamarknaði Føroya klokkan 12. Hetta ber væl til, tá bæði arbeiðsplássini eru í somu bygd. Onkuntíð kennur tú teg eitt sindur troyttan, men sum heild er hetta fínasta slag. Vanliga er tað eg sjálv, sum lati handilin upp, og tá dóttir mín Sigrun kemur úr skúlanum út á seinnapartin, kemur hon oman at hjálpa mær. Eg havi eisini aðrar gentur í handlinum, tá tørvur er á tí, sigur hon.

Handilskvinnan sigur, at hon hevur viðskiftafólk úr meginpartinum av Eysturoynni, og tá eitt nú tunnilsdagar eru, har ókeypis er at koyra úr Klaksvík og Vágum, koma eisini fólk haðani og út í Insito at keypa.

Vanligar dagar er handilin opin frá klokkan 13-17.30, men nú tað stundar til jóla, er longri opið enn vanligt.

– Í jólavikuni er opið frá klokkan 10-20, og tollaksmessudag verður opið til klokkan 22, sigur hon.

### Selur eisini fisk

Fyrrapartar arbeiðir Ann-Britt við at umsita søluna, meðan fiskur verður seldur á uppboði, og annars at tasta neyvu avreiðingartølini inn hjá teimum størru skipunum, sum góvu fyribils tøl upp, tá tey boðaðu frá landing, og fiskurin varð seldur um telefonina.

– Vit eru tvey sum selja hvønn dagin, og soleiðis eru vit fýra, sum hava sjálva søluna um hendi – eina viku í senn.

Henni dámar sera væl arbeiði á Fiskamarknaði Føroya.

– Vit eru tilsamans sjey fólk í starvi hjá FMF. Fólk eru serstakliga fitt, og hetta er eitt ógvuliga gott arbeiðspláss, sigur Ann-Britt Johannesen, sum annars hevur alt gott at bera sínum arbeiðsplássi og sínum starvsfeløgum, bæði á Fiskamarknaði Føroya og í handlinum, Insito Fashion.